

# Betri bati

## – hjálp til langtíðarskadd

**Betri Bati** er ein nýggj tænasta til arbeiðsskaðatryggingina hjá Betri Trygging. Við Betri Bata veita vit skjóta og góða hjálp, um starvsfólk fær arbeiðsskaða, ið krevur sjúkramelding í longri tíð.

betri trygging



**Allur bati bøtir, siga vit, men vit vita eisini, at skjótur bati bøtir betur. Sama um arbeiðsskaðin ávirkar kroppin, nervalagið ella elvir til sálarligar trupulleikar.**

Men tað kann vera trupult at vita, hvør besta hjálpin er, hvør tørvurin er og hvørji rættindini eru. Við Betri Bata hava vit fólk, ið eru til reiðar at lofta.

Tá lækni hevur staðfest, at talan er um langa sjúkramelding, veita vit beinanvegin ein sosialráðgeva at hjálpa skadda í fløkjasligu skipanini. Harumframt veita vit ein fastan toghaldara hjá Betri Trygging.

Endamálið er at tryggja neyðuga og hóskandi hjálp, bæði tá umræður kanningar, viðgerð og møguliga endurbúgving fyri at sleppa skjótt og trygt aftur til arbeiðis.

Skjótur og góður bati er betri fyri tann, ið verður raktur. Tað er betri fyri tey avvarðandi. Tað er betri fyri arbeiðsgevaran – og eisini fyri samfelagið.

Tí bjóða vit nú Betri Bata.



## Betri Bati bjóðar

- At rinda fyri ávísta serlæknahjálp og kanningar
- Viðgerð og uppvenjing
- Persónligan sosialráðgeva
- Persónligan toghaldara hjá Betri Trygging
- At framtíð og ynski hjá skadda verða tikin í álvara
- Hjálp til viðkomandi endurbúgving, um neyðugt

## *Soleiðis er tilgongdin við Betri Bata*

### Innleiðandi samrøða

Eftir at skaddi er sjúkrameldaður, meta vit um málið. Er tænastan við Betri Bata viðkomandi, bjóða vit skadda inn til samrøðu, har felags støða verður tikin til, um Betri Bati kann hjálpa skadda at koma seg skjótari.

### Persónligur sosialráðgevi

Fyri at finna fram til tørvin og hvørja hjálp skaddi hevur rætt til frá myndugleikunum, veita vit alt fyri eitt samband við persónligan sosialráðgeva. Ráðgeving og hjálp taka altíð støði í støðuni og umstøðunum hjá skadda.

### Læknaligar metingar og kanningar

Vit rinda fyri ávístar læknaligar kanningar, soleiðis at skaddi fær hjálp at koma seg aftur.

### Viðgerð og uppvenjing

Vit rinda fyri neyðuga viðgerð – til dømis hjá fysioterapeuti, ergoterapeuti, kiropraktori, sálarfrøðingi ella øðrum viðkomandi viðgera, alt eftir hvør skaðin er.

### Bestu framtíðarmøguleikar

So hvørt, sum kanningar og viðgerðir verða framdar, taka vit í felag støðu til spurningar, so sum: Kann skaddi fara aftur í gamla starvið? Er neyðugt at minka um arbeiðstíðina, tillaga uppgávurnar ella at broyta starvið? Við loyvi frá skadda samskifta vit við arbeiðsgevaran um møguleikarnar og hjálpa við endurbúgving, um tað er neyðugt.

*Tí allur bati bøtir,*
*men* ***skjótur bati***
***bøtir betur***

## Vit eru altíð klár at hjálpa

Ynskir tú ráðgeving ella hjálp í samband við ein arbeiðsskaða, ella hevur tú spurningar um Betri Bata, ert tú altíð vælkomin at seta teg í samband við okkum.

**Ring 348 600**

betri trygging